# Heilsan úr Jakarta í Indonesia

**Fyri nærum trimum vikum síðani vóru Bjørghild Djurhuus og Jan á Argjaboða send til Jakarta í Indonesia, har tey skulu upplýsa um fyrimunirnar við bróstageving. Nú hava tey sent okkum heilsan úr Indonesia**

MENNINGARHJÁLP
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Bjørhild Djurhuus við einum lítlum barnið á fanginum*

Hóast fráferðin til Indonesia varð útsett nakrar vikur vegna vatnflóð í Jakarta, og hóast ógvuslig kavaódn var í Keypmannahavn, komu tey bæði Bjørghild og Jan fram til Indonesia í øllum góðum. Mánadagin 26. februar hittust tey á skrivstovuni hjá Mercy Corps, felagsskapinum tey starvast hjá.

- Eftir at vit vóru kunnað um virksemið hjá Mercy Corps í Indonesia og serstakliga um okkara verkætlan, Health Start, fóru vit beint til verka, siga tey í brævinum til okkara.

## Geva pulvurmjólk

Endamálið við verkætlanini er at økja um talið á kvinnum, sum geva bróst í Indonesia. Hugburðurin hjá nógvum kvinnum er, at pulvurmjólk er betur enn móðurmjólk.

- Hesin hugburður verður stuðlaður av multinationalum fyritøkum, sum selja pulvurmjólk. Eitt nú verða ljósmøðurnar, sum selja mjólkina, bodnar ferðir til Mekka, um tær megna at økja um søluna av pulvurmjólk, segði Jan á Argjaboða í greinini í Sosialinum, áðrenn fráferð.

Verkætlanin, sum Landsstýrið hevur avgjørt at stuðla, verður rópt "Healthy Start" A Model to Improve Breastfeeding in Indonesia.

## Ferðsluruðuleiki

Bjørghild og Jan greiða frá, at skrivstovan og hotellið liggja í Sunnara parinum av høvuðsstaðnum Jakarta, meðan øll verkætlanin fer fram norðanfyri býin. Sostatt skulu tey koyra gjøgnum tættu ferðsluna í ein til tveir tímar, hvørja ferð tey skulu út.

- Bara tann sum hevur roynt at koyra í meldurtíðini her, kann ímynda sær hetta fyribrigdið. Men vit mugu fer eftir fer staðfesta og ásanna, at bilførararnir her eru einastandandi. Teir floyta og koyra annars í so smølum gøtum, at vit títt og ofta hugsa, at nú endar galið. Men nei, so er ikki, vit koma fram í øllum góðum, siga tey bæði Bjørghild og Jan.

## Skulu forvitnast

Tey hava nú fingið til uppgávu at fara út og forvitnast og undrast, so tey kunnu staðfesta, hvar setast skal inn og hvar skipanin haltar mest.

Síðani skulu tey skriva eina frágreiðing um eygleiðingarnar og gera eina framtíðar ætlan fyri økið.

Hjálparfelagsskapurin hevur peikað út fýra øki, sum tey skulu kanna. Í økjunum eru tvey sjúkrahús, nógvar heilsumiðstøðir, sum verða róptar "Puskesmas" og nakrar viðgerðarstovur, "Posendu" róptar.

## Runa og gangur

Tey hava longu vitjað fleiri støðir, og eru tær sera ymiskar.

- Í einari var enn flóð, sum var eitt ræðuligt runudíki. Nógv fólk vóru stúva saman og har var ein øgiligur gangur. Henda dagin komu 275 børn sum skuldu koppsetast fyri meslingar, polio og stívkrampa. Eisini er høvið at viga børnini einaferð um mánaðin, siga tey bæði Jan og Bjørghild, sum annars onki hava merkt til herviligu náttúruvanlukkurnar, vit frætta um dagliga.

## Vantandi reinføri

Tey hava eisini vitjað eitt sjúkrahús, har tey øtaðust um vantandi reinførið og umstøðurnar annars.

- Millum annað vóru fleiri børn í somu vøggu og onnur børn, sum mamman hevði átt og var farin frá. Framtíð teirra er óviss, summi eru heppin og verða ættleidd, meðan myndugleikarnir taka sær av øðrum, siga tey bæði út Indonesia.

Jan á Argjaboða og Bjørghild Djurhuus siga annars, at fólkini í Indonesia eru ómetaliga blíð og fyrikomandi og løtt at koma í samband við. Tey hava ein tolk við sær allastaðni, tí fólki tosar ikki nógv enskt.



*Indonesisk mamma sum gevur lítla barnið sínum bróst*

## Ein sólskinssøga hiðani:

44 ára gamli indonesarin Darmi Teungku misti alla familjuna, konu og trillingagentur í herviligu vatnflóðini, sum kravdi fleiri hundrað túsund mannalív annan jóladag í 2004. Í fjør giftist hann uppaftur við 28 ára gomlu Mariati. Darmi sigur, at nýggja konan og hann ynsktu sær eitt barn. Konan bleiv við barn, og so løgið tað ljóðar: tá hon skuldi eiga, vísti tað seg, at talan var ikki bert um eitt barn, men trillingar: tríggjar gentur. Darmi heldur, at Guð hevur givið honum tær tríggjar døturnar aftur, í staðin fyri tær hann misti.